## Ringasta keyp í ár

Fyrrverandi enska landsliðsstjørnan, Gary Lineker, staðfestir í klummu sínari í Daily Mail, at Alberto Aquilani hjá Liverpool ber prísin sum vánaligasta keypið í enskum fótbólti í ár. – Hann kostaði meira enn Jermaine Defoe, sum er toppskjútti í Premier League, men tað skuldi tú ikki trúð. Ætlandi skuldi hann avloysa Alonso, men fyrst varð hann illa skaddur, og nú tykist tað ikki, sum hevur Benitez nóg stórt álit á honum. Og í øllum førum hevur venjarin ikki roynt at koyrt hann inn á liðið. So fyri £20 milliónir má hann metast sum vánaligasta keypið hetta kappingarárið, staðfestir Gary Lineker.



## Rafa aftur á eggini

Tað gongur framveigs einki serligt hjá Liverpool. Leygardagin spældu teir á útivølli móti Portsmouth, sum er niðast í Premier League, men tað hjálpti lítið hjá Liverpool, sum mátti leggja rygg til 2-0 tap. Og enntá mátti spæla helvtina av dystinum við 10 monnum, eftir at Javier Masherano varð rikin av vølli. Undir dystinum høvdu áskoðararnir skelti, har tað stóð skrivað "You'll be sacked in the morning", og hetta hóvaði sjálvandi ikki Rafael Benitez, sum er undir stórum trýsti. Hetta vikuskiftið var tað tó ikki hansara navn, sum stóð á ensku baksíðunum, tá ein venjarauppsøgn varð veruleiki.




**Karina Debes og Sólvá Dimon hava verið partur av bestu donsku deildini í kvinnuflogbólti síðstu fýra mánaðirnar. Eftir jól heldur Sólvá fram, men tá kemur Karina heimaftur at spæla við Fleyr**

Mynd: Thomas Guldager

## Tvær føroyskar kvinnur hava síðsta hálva árið spælt í bestu deildini í kvinnuflogbólti niðri, og báðar hava tær fingið álit frá venjarunum og nógva spælitíð. Sólvá Dimon heldur fram eftir nýggjár, men Karina Debes kemur nú heimaftur at spæla við Fleyr



einstistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Í hálvtannað ár hevur Sólvá Heidi Dimon av Tvøroyri spælt flogbólt uttanlands, so hóast hon bara er 21 ára gomul, hevur hon longu royndir frá flogbólti í Luxembourg, Svøríki og nú eisini Danmark, meðan hetta er fyrstu ferð, at 19 ára gamla Karina Poulsdóttir Debes av Argjum roynir seg sum spælari uttan fyri landoddarnar.

Báðar lata væl at og báðar hava somuleiðis fingið nógva spælitíð í feløgum sínum. Sólvá spælir við Brøndby VK, sum er á triðja plássi og bara hevur tapt ímóti teimum báðum liðunum omanfyri, og Karina við Gentofte Volley, ið er nummar sjey av teimum átta liðunum í bestu donsku deildini í kvinnuflogbólti, elitudeildini, men við sama stigatali sum tey bæði liðini, ið eru beint omanfyri.

Felags er eisini, at flogbólturin fer við frítíðini, tí báðar fyrst og fremst eru niðri í mestsum somu útbúgvingarørindum. Tær hava studentsútbúgving úr Føroyum, men taka eyka lærugreinar aftrat, so tær fakliga kunnu vera betur fyri, tá farast skal víðari á útbúgvingarleiðini, og báðar ganga á sama stað, Københavns Voksenuddannelsescenter, so tí hittast tær javnan í gerandisdegnum.

Sólvá heldur fram á KVUC, sum er styttingin fyri útbúgvingarstaðið, til summarfrítíðin kemur, men Karina verður í næstum liðug við sínar lærugreinar og kemur í næstum heimaftur til Føroya, og tá verður hon at síggja aftur á liðnum hjá Fleyr, sum í løtuni roynir at vera við í oddastríðnum í Eik-liguni hjá kvinnum. Sólvá hevur sáttmála við sítt danska felag fyri alt kappingarárið, so hon verður verandi í donskum flogbólti, tá kappingin heldur fram eftir jólasteðgin, sum nú verður.

### Nógv seriøsari

Sólvá og Karina eru samdar um, at flogbólturin í Danmark er á hampuliga høgum stigi, og at tað tí er bæði læruríkt og avbjóðandi at spæla í bestu donsku kvinnudeildini. Og í øllum førum er munurin stórur, verður samanborið við kvinnuflogbóltin í Føroyum.

– Her verður flogbólturin tikin nógv meira seriøst og nógv meira